# Barnasjónleikur í miðbýnum

**Leygardagin verða sjey spennandi framførslur ymsa staðni í Havn, í sambandi við barnasjónleikarastevnuna Stjørnueyga**

SJÓNLEIKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Meginfelag áhugaleikara Føroya, MáF, skipar aftur í ár fyri stórari barnasjónleikarastevnu í Havn. Í ár hevur stevnan fingið heitið Stjørnueyga.

Fyrireikararnir siga, at tiltakið byrjar við stórari gleðisskrúðgongu við gyklarum frá Sjónleikarhúsinum oman í gongugøtuna kl. 11. Har verða allir luttakandi bólkarnir og á skránni, umframt barnakór, útisjónleik, trummur og eitthvørt óvæntað.

Vegna Tórshavnar Býráð setir Hildur Eyðunsdóttir, forkvinna í Mentanarnevndini, stevnuna, og hareftir verða framførslurnar í ávikavist Sjónleikarhúsinum og í Meiarínum í Tórsgøtu. Tann fyrsta framførslan verður longu kl. 12, og hin seinna kl. 17.

Í ár er tiltakið lagt soleiðis til rættis, at til ber at síggja allar leikirnar, tí skráin er sett soleiðis saman, at tá ein leikur er liðugur, byrjar hin næsti eitt korter seinni.

Eisini verður andlitsmáling í gongini í Sjónleikarhúsinum, sum ung frá Dramaverkstaðnum skipa fyri. Og tað besta av øllum: Alt hetta er ókeypis.



*Leygardagin 5. mai skipar MáF fyri stórari barnasjónleikarastevnu í Havn. Óivað fer stevnan at seta lívligan dám á býin leygardagin. Stevnan var eisini í 2001, 2002, 2003 og 2005, og hava eini 100 til 150 børn í aldrinum 9-14 ár luttikið við leikum og sangum hvørja ferð.*





Myndir frá leiki í frítíðarskúlanum Smílibýlinum í Havn

# Beinta Festirstein í Jinx




Komandi tvær vikurnar sýnir Beinta Festirstein fram málningar sýnar í Galleri Jinx í Havn

Beinta varð útbúgvin professiónsbachelor í Keypmannahavn við lærugreinunum tekstil, kompositión, farvulæru, tekning og vatnlitsmáling v.m í 1979. Hon var við í felagsframsýning á Kunstindustrimuseet í Keypmannahavn í 1979.

Síðani tá hevur hon fingist við myndlist av ymiskum litfari, textli, collage, vatnlit-, olju- og akrylmáling. Frá tí hon fekk mynd við á ólavsøkuframsýningini, hevur hon serliga arbeitt við olju- og acrylmálningum, umframt roynt seg við collagu og olju- og acrylmáling.

Beinta er útbúgvin sum Cand. jur. frá Lærda háskúlan í Keypmannahavn. Framsýningin hongur uppi til 15. mai.

*rd.*

# Føroya Lærarafelag nú á einum stað

**Fyri stuttum fyltu Bókadeildin og Barnablaðið 50, og nú málgagnið hjá felagnum, Skúlablaðið, er komið út í 75 ár, letur nýggjur portalur upp fyri virksemi felagsins**

KUNNING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*




*Portalurin er at finna á www.lararafelag.fo*

Á nýggja portalinum sigur felagið, at síðan aðalfundin í 2006 hava øll í lærarafelagnum arbeitt miðvíst at skipa portal fyri alt virksemið hjá Føroya Lærarafelag.

- Og tað er ikki so lítið. Umframt sjálvt felagið reka vit Bókadeildina, bókaklubban, Strok, Skúlablaðið og nú eisini Bókamiðsøluna, sigur felagið.

Ætlanin er, at hvør deildin hevur sína heimasíðu. Síðurnar skulu hanga saman, so at tey, sum koma inn á eina, lættliga kunnu fara á hinar eisini. Tey smáu og yngru inn á Stroknetið. Síðan inn á Bókadeildina og bókaklubban, har til ber at lesa um bøkur og keypa frá Bókamiðsøluni.

Sagt verður víðari, at í fakfelags- og skúlamálum verður serliga heimasíðan hjá Skúlablaðnum virkin. Afturat Skúlablaðnum, sum kemur út 7 ferðir um árið, skal heimasíðan fara longri enn blaðið megnar og eisini draga fram mál, sum dagliga stinga seg upp.

Við hesum tiltaki vónar felagið:

At portalurin fer at vera til mikið gagn hjá lærarum, børnum og øllum teimum, sum hava áhuga fyri skúlaviðurskiftum og bókum.

At portalurin fer at birta upp undir kjakið um skúlaviðurskifti, so at úrslit spyrjast burturúr.

At portalurin kann gera sítt eisini at lata upp dyrnar til óendaliga heimin í bókmentunum og soleiðis eggja ungum og gomlum at lesa.